


# Tað regnar ongantíð í Lalandia

Tað er altíð gott veður í Lalandia. Gisti í einum deiligum summarhúsi, ið liggur nær við strondina, náttúruna og 25.000 m² av stuttligum innandura ítrivum. Har er stórt tropiskt baðiland, stórt spælilandi, skoytuhøll, bowlinghøll og mangt annað. Lalandia er besti frítíðardepil fyri alla familjuna - árið runt!

Fáa meir at vita á www.lalandia.dk og bílegg tína ferð hjá Atlantic Airways ella Smyril Line.

ATLANTIC AIRWAYS

## Kom skjótt til Lalandia við Atlantic Airways

**Lalandia í 1 viku kr. 15.995.-**
(2 vaksin og 2 børn).
Galdandi í skúla-summarfrítíðini (27.06-09.08 2008).

Íroknað prísin er flogferð við mati og drekka til Keypmannahavnar ella Billund, gisting í B2 húsi í Lalandia í 1 viku við fríðari atgongd til Baðiland, Monkey Tonky land, øll undirhald til børnini og reingerð við fráferð, ferðaavgjøld. Atlantic Airways kann eisini hjálpa til við leigubili. Orkugjald kr. 2.10/kwh verður goldið við fráferð.

**Bíleggjast kann bert á tel. +298 34 10 10.**

## Til tey sum vilja hava eitt sindur meira - til Lalandia við bili.

**2 VAKSIN + 2 BØRN (5-12 ár) Kr. 13.045,-**
Gist verður í kamari uttan vindeyga og við 4 koyggjum og wc/bað.
Íroknað kostnaðin: Tórshavn-Hanstholm fram og aftur í reyðgulari fráferð 22.05-05.06 & 29.08 2008 í kamari uttan vindeyða + 1 bil (upp til 1,9 m h., 5 m l. og 2 m b.) + uppihald í 1 viku í íbúð B2. Avgreiðslugjald og oljugjald er íroknað kostnaðin. Orkugjald kr. 2,10/kWh verður goldið við fráferð.

**Bílleggi ferðina hjá Smyril Line á:**
**TEL +298 34 59 00 ella**
**BOOKING@SMYRIL-LINE.FO**

Lalandia

www.lalandia.dk · tel. +45 5461 0690
Lalandia Centret 1 · DK-4970 Rødby

---

**Mentamálaráðið**
AÐALSKRIVSTOVAN

## Løgfrøðingur/Fulltrúi

**Starvið**
Í sambandi við, at ein av løgfrøðingum okkara fer úr starvi, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja í aðalskrivstovuni.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:
- Lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið
- Løgfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til landsstýriskvinnuna, starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur løgfrøðiligt embætisprógv.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir úr øðrum starvi. Harumframt skalt tú bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum o.ø.

**Vit bjóða:**
- Spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir
- Sjálvstøðugt starv
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Luttøku í løgfrøðiligum samstarvsmótum
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðinga-felagið. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, C.V. o.ø skal sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. mai 2008 kl. 16.00. Starvið verður at seta frá 1. august ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50 ella 55 50 51.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Í **aðalskrivstovuni** eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Bygnaðurin í Mentamálaráðnum er býttur í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýriskvinnuna.

---




Sethúsini standa við blindveg í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi. Fáir minuttir eru á Vaglið, til handils, í dagstovn og í skúla.

Húsini, ið eru bygd í 1950-unum eru høvuðsumvæld í 2000. Grundøkið er 384 m². Góðir møguleikar eru at byggja upp í húsini.

Húsini eru uml. 120 m² í tveimum hæddum við sera góðum útsýni.

Í ovaru hæddini er køkur, borðstova og stova.

Í niðaru hæddini eru tvey kømur, baðirúm, gongd, trappa og vaskirúm/fýrrúm.

**Myndir eru at síggja á**
**www.123hjemmeside.dk/dungagota7**

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

**Áhugað kunnu venda sær til Unnie Justinussen á tlf. 322231 ella 260105**

---



*Eitt sindur hugnaligari...*

Hvat við at forkela teg sjálvan ella gleða onkran annan?

Góðar umstøður kunnu vit bjóða tær.

Royn Luddastovu í Leynum ella Bakkastovu við Ljósá.

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**